LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 21. august 2023
J.Nr.: LUM-16- 23/07506-31
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um plastdálking á havnarlagnum á Eiði

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Setiumboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um plastdálking á havnarlagnum á Eiði. Setiumboðsmaðurin hevði onki at finnast at málsviðgerðini hjá Umhvørvisstovuni av málinum, men helt tað tó vera óheppið, at Umhvørvisstovan bæði er ráðgevandi myndugleiki samstundis sum hon er kærumyndugleiki á økinum. Umboðsmaðurin heitti tí á landsstýriskvinnuna í Umhvørvismálum um at umhugsa at leggja kærumyndugleikan til annan myndugleika at umsita. Setiumboðsmaðurin helt harafturímóti, at viðgerðin hjá Eiðis kommunu av málinum hevði verið alt annað enn nøktandi, og gav kommununi eina átalu fyri hetta. Av tí at kommunan nú tykist at hava fingið skipað eftirlitið á nøktandi hátt, valdi setiumboðsmaðurin ikki at gera meira við málið, men heitti á kommununa at lata seg frætta, hvørja fyriskipan hon hevur sett í verk fyri at tryggja sær, at plastdálkingin ikki endurtekur seg.*

## 2. Málslýsing

Við skrivi, dagfest 21. mars 2023, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> “Sum borgari á Eiðis kommunu (EK), fann eg saman við grannum; plasttrevjur og polystyrene á bæði Keiøkinum og í partum í bygdini. Tað var skjótt greitt, at hettar var dálking ið stavaði frá framleiðslu av aliringum. Privata fyritøkan B (...) framleiðir aliringar á Eiði. B leigar seg inn keiøki hjá EK. Framleiðslan av aliringum fer altso fram undir opnum himmali. Umhvørvisstovan (US) verður fráboðað, runt um EK, 09/2019. Fráboðarin (eg) sær hettar sum ein bygnaðarligan trupulleika. US boðar EK frá, innan stutta tíð. Í dag skriva vit 20/03/2023. Dálkingin heldur áfram. Klagan til LUM snýr seg um hettar. Undir hesum, at US eru ov lin yvirfyri EK, og EK er ov lin yvirfyri B. Hettar ger at B framhaldandi fær loyvi og umstøður at dálka. Borgarin fær ikki steðga dálkingini, EK setur ikki nøktandi treytir. Sum eigari og útleigari, hevur EK ábyrgd forða fyri dálkingini. EK eigur at verja borgarar og náttúruna. Hettar ikki skal fara fram. Eg havi sitið við myndugleikum sum tala hvørja aðra eftir munninum, ímeðan vit borgarir sum búgva og liva her, liva við dálkingini alla hesa tíð, og longri. Hvussu leingi skulu vit liva við hesum avtrat? ”

Vegna ógegni hjá umboðsmanninum hevur formansskapurin í løgtinginum sett Sólju í Ólavsstovu, fyrrverandi umboðsmann, sum setiumboðsmann at viðgera hesa klagu.

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 26. apríl 2023 varð klagan send ávikavist Umhvørvisstovuni og Eiðis kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Umhvørvisstovan og Eiðis kommuna biðin um at lata setiumboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Í skjølunum, sum setiumboðsmaðurin hevur fingið frá Umhvørvisstovuni, sæst, at málið er byrjað við, at klagarin tann 3. september 2019 vendi sær til Umhvørvisstovuna við myndatilfari, sum vísti umfatandi plastdálking á havnarlagnum á Eiði. Í tíðarskeiðinum frá september 2019 til klagað var til umboðsmannin í mars 2023 hevur klagarin 14 ferðir vent sær til Umhvørvisstovuna og gjørt vart við framhaldandi dálking á havnarlagnum. Í hesum sambandi hevur Umhvørvisstovan beinanvegin sett seg í samband við kommununa við eini áheitan um at gera nakað við plastdálkingina. Umhvørvisstovan hevur í fleiri umførum spurt aftur til málið og verið á fundi við kommununa um, hvussu trupulleikin við dálkingini kann verða loystur.

Í skjølunum, sum setiumboðsmaðurin hevur fingið frá Eiðis kommunu, sær út til, at kommunan ikki fyrrenn 12. februar 2022 byrjar at skjalfesta viðgerðina av málinum, undir hesum samskifti við Umhvørvisstovuna.

Frágreiðingin frá Umhvørvisstovuni, dagfest 22. mai 2023, og frágreiðingin frá Eiðis kommunu, dagfest 16. mai 2023, lýsa gongdina í málinum, og eru tær soljóðandi:

Frágreiðingin frá Umhvørvisstovuni:

> **“Viðvíkjandi: Frágreiðing um viðgerð hjá Umhvørvisstovuni um plastdálking**
>
> Umhvørvisstovan fekk hin 26. apríl 2023 skriv frá Løgtingsins umboðsmanni, har biðið verður um eina frágreiðing um viðgerðina av máli um dálking við plasti á havnarlagnum á Eiði.
> Eftirlit við virkjum er býtt millum Umhvørvisstovuna og kommunurnar.
>
> Umhvørvisstovan er eftirlitsmyndugleiki tá tað snýr seg um sonevnd serliga dálkandi virki sambært kap. 5 í umhvørvisverndarlógini. Hesi eru nevnd í fylgiskjalinum til lógina.
>
> Sambært § 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur hava kommunurnar eftirlit við virkjum, sum ikki eru fevnd av kap. 5 í lógini.
>
> Virkið, sum málið snýr seg um, B, er ikki fevnt av kap. 5 í lógini, og er tað tí Eiðis kommuna, ið er myndugleiki, og hevur eftirlit við virkinum. Umhvørvisstovan er kærumyndugleiki í sambandi við avgerðir hjá kommunum eftir lóggávuni á umhvørvisøkinum, og kann tí ikki fara inn í ítøkilig mál, har kommunan er myndugleiki. Hinvegin kann Umhvørvisstovan vegleiða kommunum um teirra leiklut sum eftirlitsmyndugleiki.

Umhvørvisstovan hevur vegleitt klagara um, at Eiðis kommuna er umhvørvismyndugleiki í málinum og at Umhvørvisstovan er kærumyndugleiki og kann tí ikki fara inn í málið. Umhvørvisstovan hevur síðani málið byrjaði javnan samskift við bæði klagaran og Eiðis kommunu um málið og mint á, at kommunan hevur ábyrgd av hesum máli.

Eiðis kommuna hevur kunnað Umhvørvisstovuna um átøk, sum eru avtalaði við B, millum annað er sáttmáli um at halda økið reint, fundir við áminning, avtala nýggja mannagongd, har nýggj útgerð er keypt at rudda við og bingjur at burturbeina í.

Á fundi við Eiðis kommunu 27. mars 2023 bað Umhvørvisstovan kommununa um eina frágreiðing um gongdina í málinum, við serligum denti á hvat kommunan hevur gjørt fyri at loysa trupulleikan og gjørdi Umhvørvisstovan enn eina ferð vart við, at kommunan hevur skyldu til at taka eina avgerð. Fundurin gav okkum ta greiðu fatan, at kommunan av álvara fór at fáa enda málið. M.a. var ein nýggjur tekniskur leiðari komin í starv.

Tann 24. apríl 2023 fær Umhvørvisstovan umbidnu frágreiðingina um støðuna við plastdálking á keiøkinum á Eiði. Í frágreiðingini verður millum annað greitt frá niðurstøðu frá fundi 19. apríl millum felagið og Eiðis kommunu. Niðanfyri er brot úr frágreiðingini:

19.04.2023 Fundur millum EK og B. Niðurstøðan frá fundinum er, at:

- alt ov nógv plastdálking hevur verið síðstu tíðina.
- økið skal ruddast beinanvegin.
- greiða skal fáast á, nær plastdálkingin fer fram, soleiðis at arbeiðið kann gerast meira skynsamt.
- EK og B hyggja økið í gjøgnum 24. apríl 2023, fyri at kanna eftir, hvussu økið sær út.
- EK hevur eftirlit á økinum vikuliga.
- fundur verður aftur millum EK og B 8. mai og 22. mai.
- á fundinum 22. mai skal avgerast, hvussu farast skal fram eftir hetta.

24.04.2023 EK og B hyggja økið ígjøgnum. Økið sær heilt gott út, men enn manglar okkurt plast at fáast upp. Hetta er plast, sum má takast upp við hond. Tosað verður um betringar, sum skulu gerast á økinum, sum kunnu minka um plastdálkingina. Partarnir møtast aftur 8. mai.

Nú í vár, tá hetta málið tíanverri vísti seg at draga út, høvdu vit eina innanhýsis meting hvørt málið var av slíkum slag, at talan var um, at Eiðis kommuna ikki røkir eftirlitsuppgávurnar, sum eru álagdar kommunustýrinum smb. § 31, stk. 3 í k. um umhvørvisreglur. Tað var tí eisini við tí fyri eyga, at meta um, hvørt Eiðis kommuna røkti sínar eftirlitsuppgávur, at Umhvørvisstovan ynski fund við kommununa. Men, sum nevnt, vísti fundurin 27. mars, at kommunan var tilvitað um sína uppgávu og hevði ítøkilig boð uppá, hvussu málið skuldi loysast. Undir fundinum varð heimildin í § 31, stk. 3, um møguleikan, at Umhvørvisstovan gevur kommununi boð um, hvussu viðurskiftini skulu fáast í rættlag, stutt havdur frammi. Men tá fundurin var liðugur, var greitt, at tørvar var ikki á brúka heimildina í § 31, stk. 3.

Vónandi er hetta svar upp á tykkara spurningar. Eru ivamál, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum. ”

Frágreiðingin frá Eiðis kommunu:

“**Frágreiðing um, hvat er hent í málinum viðv. plastdálking á havnalagnum á Eiði**

| **Dato** | **Viðmerking** |
|---|---|
| 12.02.2022 | Málið verður tikið upp aftur. Klagari sendur skriv til US um framhaldandi dálking á økinum. |
| 15.02.2022 | US heitir á EK um at taka málið upp aftur. |
| 18.02.2022 | EK sendir skriv til B, har verður, at økið verður ruddað áðrenn 28.02.2022. |
| 18.02.2022 | EK svarar US. Víst verður, hvat næsta stig verður í málinum |
| 28.02.2022 | Fundur millum B og EK. Avtalað verður, at bingjur til jarn, timbur, vanligt burturkast og plastik skulu verða á økinum. Plastikbingjan skal kunna latast aftur. Ein bingja verður gjørd, sum kann setast omanyvir, tá sagað verður. |
| 17.03.2022 | US spyr EK um, hvussu gongur við málinum |
| 17.03.2022 | EK vísir á fundin millum EK og B 28.02.2022, og at fundur er avtalaður millum partarnar í næstum. |
| 22.03.2022 | EK greiðir US frá niðurstøðuni av fundinum millum EK og B 21.03.2022. Bingjur til burturkast eru komnar á økið. Bingjan at seta útyvir, tá arbeitt verður, er ikki komin enn. Men er í gerð. |
| 11.04.2022 | Klagari boðar frá framhaldandi dálking. |
| 11.04.2022 | US spyr EK um, nær málið verður endaliga loyst |
| 19.04.2022 | EK vísir á, at nøkur viðurskiftir eru komin í rættlag, men enn manglar bingjan, ið skal setast útyvir, tá skorið verður. |
| 01.06.2022 | Fundur millum 11 borgarar á Eiði og borgarstjóran og formannin í havnanevndini. Semja er um, at málið hevur drigið út, og tey tiltøk, sum eru sett í verk, ikki hava verið nóg góð. Økið skal ruddast ordiligt, og ein loysn skal finnast á plastdálkingini. |
| 14.06.2022 | Fundur millum B og EK. Avtalað verður, at arbeiðið verður steðgað á økinum til |
| 28.06.2022 | Økið skal ruddast í hesum tíðarskeiðinum. B ruddar eisini privat økir, um plast er komið inn á økini. Eftir at arbeiðið er sett í gongd aftur, verður regluligt eftirlit. |

| | |
|---|---|
| 28.06.2022 | Fundur millum B og EK. Nógv orka er løgd í at rudda, men enn mangla 3 økir at ruddast. Maskinur eru keyptar, sum skulu brúkast í at fyribyrgja ruddingini. B vísir á, at hesar maskinur rigga væl. |
| 06.07.2022 | EK sendir teldupost til B, har víst verður á, at enn eru 2 økir, sum ikki eru ruddaði. B verður biðið um at koma við frágreiðing. |
| xx.07.2022 | Økini, sum mangla at ruddast verða ruddaði. Mett verður, at nú kemur rættuliga lítið av plastdálking, tá arbeitt verður. |
| 24.08.2022 | Fundur millum B og EK. Niðurstøðan er, at tiltøkini hava gjørt stóran mun, men enn er nakað av plast dálking. Arbeiðið verður steðgað, inntil økið er ruddað. Fundur verður avtalaður aftur fyrst í september. |
| 30.08.2022 | Klagari vísir á, at plastdálkingin ikki er steðgað. Og at B ikki hevur verksett mannagongdir fyri at forða plastdálking. |
| 01.09.2022 | EK vísir á, at tað ikki er rætt, at einki er gjørt fyri at forða plastdálking. Men rætt er, at enn er ikki heilt komið á mál. |
| 02.09.2022 | US vísir á, at málið hevur tikið alt ov langa tíð, men vónar, at málið skjótt verður loyst. |
| 07.09.2022 | Fundur millum EK og B. Tiltøkini hava gjørt góðan mun, og nýggja útgerðin riggar væl. Økið er plast frítt til tíðir, men til tíðir kemur er plast at síggja. Semja er um, at hugburðurin má betrast. |
| xx.09.2022 | Tað gongur aftur væl við arbeiðinum. Lítið av plastdálking hevur verið síðstu tíðina. |
| 15.11.2022 | Teldupostur sendur frá EK til B. Víst verður á, at tiltøkini hava gjørt stóran mun, og at plastdálkingin er nógv minkað. Men enn hendir tað seg, at tað er ov nógv plastdálking á havnalagnum. |
| xx.11.2022 | EK spyr US, um hjálp at loysa málið endaligt. |
| 01.12.2022 | US vísir á, at EK hevur ábyrgd á málinum og skal loysa málið. US er kærumyndugleiki. |
| 08.03.2023 | Klagari vísir á, at B koyrir kava á sjógv, og at allarhelst fer plast eisini á sjógv. |
| 13.03.2023 | US kallar inn til fund við EK. |
| 27.03.2023 | Fundur millum EK og US um málið |
| 19.04.2023 | Fundur millum EK og B. Niðurstøðan frá fundinum er, at:<br>• alt ov nógv plastdálking hevur verið síðstu tíðina.<br>• økið skal ruddast beinanvegin.<br>• greiða skal fáast á, nær plastdálkingin fer fram, soleiðis at arbeiðið kann gerast meira skynsamt. |

|  |  |
|---|---|
|  | <ul><li>EK og B hyggja økið í gjøgnum 24. apríl 2023, fyri at kanna eftir, hvussu økið sær út.</li><li>EK hevur eftirlit á økinum vikuliga.</li><li>fundur verður aftur millum EK og B 8. mai og 22. mai.</li><li>á fundinum 22. mai skal avgerast, hvussu farast skal fram eftir hetta.</li></ul> |
| 24.04.2023 | EK og B hyggja økið ígjøgnum. Økið sær heilt gott út, men enn manglar okkurt plast at fáast upp. Hetta er plast, sum má takast upp við hond. Tosað verður um betringar, sum skulu gerast á økinum, sum kunnu minka um plastdálkingina. Partarnir møtast aftur 8. mai.” |

Við skrivi, dagfest 14. juni 2023, vórðu viðmerkingarnar hjá Eiðis kommunu og Umhvørvisstovuni sendar pørtunum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Sama dag boðaði Eiðis kommuna frá, at hon onga viðmerking hevði til frágreiðingina frá Umhvørvisstovuni.

Tann 28. juni 2023 sendi Umhvørvisstovan soljóðandi viðmerking:

> “Frágreiðingin frá Eiðis kommunu fevnir einans um tíðina frá tí, at kommunan tók málið upp av nýggjum, sum er tá núverandi borgarstjóri, Rógvi Egilstoft, tók við sessinum. Sum tit síggja í skjølunum vit sendu tykkum 22. mai byrjaði málið longu í september 2019
>
> Okkara mál 22/01767 **Fyrispurningur um virki, undir kommunalum eftirlitið, skal umhvørvisgóðkennast** er relaterað til tað, sum er nevnt undir “xx.11.2022 EK spyr US um hjálp at loysa málið endaliga” í frágreiðingini hjá Eiðis kommunu. Niðanfyri er málsyvirlitið og avrit av svarinum vit sendu til kommununa, tvs akt 22/01767-4 er hjálagt í teldupostinum.”

Tann 4. juli 2023 boðaði setiumboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett, at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerðin av hesum máli snýr seg um málsviðgerðina hjá ávikavist Umhvørvisstovuni og Eiðis kommunu við atliti at eftirlitinum við dálkingini á havnarlagnum á Eiði. Málið er viðgjørt eftir Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og Kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur.

Sambært skjølunum í málinum byrjar málið í september 2019 í sambandi við, at ein borgari vendir sær til Umhvørvisstovuna og ger vart við, at hann saman við grannum hava funnið plasttrevjur og polystyrene á bæði keiøkinum og í pørtum av bygdini, sum stavaði frá framleiðslu av aliringum á havnarlagnum á Eiði. Viðlagt var myndatilfar, sum vísti eina umfatandi plástdálking.

**Málsviðgerðin hjá Umhvørvisstovuni**

Umhvørvisstovan hevur í innanhýsis notati, dagfest 3. september 2019, tikið støðu til, at virksemið á bryggjuni á Eiði ikki kann metast sum serligt dálkandi smb. kapittul 5 í Umhvørvisverndarlógini. Eftirlitið við virkseminum at framleiða aliringar liggur sostatt hjá Eiðis kommunu smb. § 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur.

Eg havi onga viðmerking til niðurstøðuna hjá Umhvørvisstovuni um, at kommunan hevur ábyrgdina av eftirlitinum við framleiðsluni av aliringum á Eiði.

Síðani Umhvørvisstovan fekk ta fyrstu fráboðanina um plastdálkingina tann 3. september 2019, hevur hon verið í tøttum samskifti við kommununa um dálkingina á havnarlagnum. Umhvørvisstovan hevur í fleiri umførum boðað kommununi frá, at talan er um umfatandi dálking, og at økið skal ruddast. Umhvørvisstovan hevur harumframt vegleitt kommununa um, hvussu viðurskiftini kundu fáast í rættlag.

Umhvørvisstovan kunnaði beinanvegin klagaran um, at eftirlitið við dálkingini lá hjá kommununi, og at Umhvørvisstovan ikki kundi viðgera tað ítøkiliga málið, tí hon, sambært § 38 í kunngerðini, er kærumyndugleiki fyri tær avgerðir, sum kommunan fór at taka í málinum.

Umhvørvisstovan hevur í sambandi við málið gjørt eina innanhýsis meting av, hvørt talan var um, at Eiðis kommuna ikki røkir sína eftirlitsuppgávu, og um Umhvørvisstovan tí átti at yvirtikið eftirlitið. Umhvørvisstovan kom tó til ta niðurstøðu, at kommunan var tilvitað um sína uppgávu og hevði ítøkilig boð uppá, hvussu málið skuldi loysast.

Eg havi onga orsøk at finnast at málsviðgerðini og metingunum hjá Umhvørvisstovuni í hesum máli.

Hinvegin haldi eg, at kunngerðin setur Umhvørvisstovuna í eina óhepna tvístøðu, tí hon, sum fakkunnleiki á økinum, bæði skal ráðgeva og hava eftirlit við kommununum í umhvørvisspurningum, samstundis sum hon skal vera ein óheftur kærumyndugleiki í somu málum.

Eg fari tí, at heita á landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum um at umhugsa at leggja kærumyndugleikan til annan myndugleika at umsita.

**Málsviðgerðin hjá Eiðis kommunu**

Í frágreiðingini frá Eiðis kommunu sær út til, at ongi skjøl eru skjalførd í málinum fyrr enn tann 12. februar 2022. Áðrenn hetta tíðarskeið er onki skrásett um nakað samskifti við klagara, leigara ella Umhvørvisstovuna um dálking á økinum.

*Tíðarskeiðið september 2019 til februar 2022*
Sambært innlitslógini hevur ein almennur myndugleiki í øllum málum, har ein avgerð skal takast, skyldu til at notera allar upplýsingar, sum myndugleikin fær munnliga, skrivliga ella á annan hátt. Skyldan umfatar allar upplýsingar um tær veruligu umstøður, sum kunnu hava týdning fyri avgerðina í málinum. Notatskyldan er somuleiðis galdandi fyri øll týðandi málsviðgerðarstig, sum verða gjørd í málinum.

Hóast tað ikki er nøkur beinleiðis lógaráseting, ið áleggur almennum myndugleikum at skráseta sínar upplýsingar og skjøl, so hava almennir myndugleikar skyldu at skjalføra. Skyldan at skjalføra er staðfest í góðum fyrisitingarsiði og fylgir óbeinleiðis reglunum um alment innlit og reglunum um almenn savnindi. Ein myndugleiki eigur at skjalføra inn– og útgangandi post, tá skjalið hevur týdning fyri eitt mál ella málsviðgerðina sum heild. Dømi um skjøl og teldupostar, sum *skulu* skjalførast, er samskifti við aðrar myndugleikar, svar uppá áheitanir og avgerðir v.m.

Eg haldi, at tað er alt annað enn nøktandi, at Eiðis kommuna ikki hevur skjalført skjølini í málinum ella hevur skrivað niður samrøður og fundir, sum kommunan hevur havt við Umhvørvisstovuna og leigaran av økinum.

Av tí at ongi skjøl eru í málinum, sum vísa, at kommunan hevur røkt sína eftirlitsskyldu ella hevur tikið stig til fyriskipanir, sum skulu forða fyri dálking á økinum, kann eg ikki annað enn leggja til grund tær upplýsingar, sum eg havi fingið í skjølunum frá Umhvørvisstovuni.

Skjølini í málinum frá Umhvørvisstovuni geva eina greiða ábending um, at eftirlitið hjá kommununi als ikki hevur verið nøktandi.

Grundað á hetta fari eg tískil at geva kommununi eina átalu fyri ikki at hava røkt sína eftirlitsskyldu sambært § 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994.

*Tíðarskeiðið  februar 2022 til apríl 2023*
Tað sæst av frágreiðingini frá Eiðis kommunu, at síðani februar 2022 hevur kommunan skjalfest málsviðgerðarstigini í eftirlitinum við dálkandi virkseminum á havnarlagnum. Hóast kommunan hevur gjørt fleiri royndir at fáa ruddað økið og hevur verið í tøttum samskifti við leigaran um plastdálkingina sæst, at bæði klagarin og Umhvørvisstovan kunnu skjalprógva við myndatilfari, at økið framhaldandi er dálkað. Onki verður tó sagt ella skjalprógvað um, hvussu umfatandi dálkingin hevur verið á landi, og hvussu nógv plastikk møguliga er farið á sjógv.

Eftir at klagað varð til umboðsmannin tann 21. mars 2023 sær út til, at munandi stig verða tikin til at bøta um plastdálkingina á havnarlagnum.

Á fundi millum kommununa og leigaran tann 19. apríl 2023 varð niðurstøðan tann, at alt ov nógv plastdálking hevur verið á økinum, og at økið skuldi ruddast beinanvegin. Á ástaðarfundi tann 24. apríl 2023 varð staðfest, at økið var ruddað, men at enn vantaði plast at fáast upp. Hetta er plast, sum skal takast upp við hond. Avtalað varð, at á fundi tann 22. mai 2023 skuldi avgerast, hvussu farast skuldi fram eftir hetta tíðarskeið.

Av tí at meginparturin av økinum er ruddað og tað tykist, sum um kommunan fremur sítt eftirlit á nøktandi hátt, geri eg ikki meira við málið í løtuni. Eg fari tó at heita á kommununa um at lata meg frætta, nær restin av plastinum væntast at verða tikið upp. Harafturat fari eg at mæla til, at kommunan ger eina fyriskipan um slíkt dálkandi virksemi, sum við jøvnum millumbilum verður eftirmett.

Burtursæð frá omanfyrinevndu átalu og viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
setiumboðsmaður